# Tað besta ABBA síðan ABBA

Fyrst útlendska navnið, sum fer at framføra á ársins Summarfestivali, er nú kunngjørt. Hóast hesin bólkur bert er ein eftirlíkningur av heimskenda bólkinum ABBA, so vilja ummælarar verða við, at hetta er besti ABBA bólkurin síðan ABBA.

Ummælara kring knøttin hava nærmast lovprísa bólkinum. Heilt frá Amerika til Bretland hava túsundtals fólk staði í kø fyri at síggja ABBA- the Show, og tað sigst, at ABBA tónleikurin frá 70'unum og 80'unum hevur fingið eina veruliga uppreisn. Mamma Mia the Movie, Singstar og Mama Mia sangleikurin hava, saman við ABBA – the Show blást lív aftur í tónleikin, og ABBA løg byrja at finna sín veg aftur á nógvar av heimsins hitlistum.

Nú er tíðin komin til at føroyingar eisini fáa møguleikan at uppliva tað besta ABBA síðan ABBA, og verður tað á Vágsbøi í summar.

- Vit hava leingi arbeitt við at fáa ABBA – the Show til Føroya, og rákið, sum er komi síðan seinasta Summarfestival hevur gjørt, at vit mettu tíðina verða komna til at taka ABBA – the Show til Føroya, sigur Steintór Rasmussen, fyriskipari av Summarfestivalinum við Planet.

Nógvir eftirlíkningsbólkar eru kring knøttin – summir betri enn aðrir, og serstakliga bólkurin ABBA hevur eina ørgrynnu av eftirlíkningum.

- Vit hava prátað við fólk sum hava hoyrt ABBA – the Show, og øll hava viðmælt okkum at taka tey við á Summarfestivalin. Vit vita, at nógv eru um boðið, men eftir øllum at døma er ABBA – the Show tann besti ABBA bólkurin sum er, sigur Steintór.

Víðari sigur hann.

- Vit ivaðist leingi um hvørt tað var rætt at taka ein eftirlíkningsbólk á Summarfestivalin, men tað er ógjørligt at fáa tað veruliga ABBA at framføra, og tónleikurin hjá teimum er enn heimskendur og ótrúliga vælumtóktur – eisini her í Føroyum – so vit mettu tað í hesum førinum at verða eitt hugskot, sigur hann.

Summarfestivalurin kappast við seg sjálvan

Í 2008 var nærum eingin annar stórur festivalur uttan júst Klaksvíkarfestivalurin Summarfestivalurin, men í ár er støðan ein onnur. Nýggir festivalar síggja fyri fyrstu ferð dagsins ljós, og aðrir, sum hava verið niðurlagdir spíra upp av nýggjum. Spurningur er so hvussu hetta ávirkar Føroya størsta festival – Summarfestivalin.

- Vit fegnast um at tað aftur er ávegis ein føroysk festivalmentan. Tað hækkar um støðið, og meira fokus verður sett á tað føroyska summari sum eitt festivalsummar. Í mun til kappingina kann sigast, at Summarfestivalurin kappast mest við seg sjálvan. Vit royna hvørt ár at betra um umstøðurnar á festivalinum, tískil taka vit tað ikki sum eina hóttan, at aðrir festivalar stinga seg upp. Nú fáa vit so at síggja hvussu tað fer at ganga hjá teimum, sigur Steintór.

Aðrir festivalar hava fyri tíð síðani almannakunngjørt útlendskar bólkar ið koma til Føroya, men hetta er fyrsta útlendska navnið, sum Summarfestivalurin borðreiðir við.

- Hetta verður sjálvsagt ikki einasta útlendska navnið sum kemur á Summarfestivalin. Vit fara skjótt at almannakunngera enn ein útlendskan bólk. Føroyingar hava bíða nóg leingi eftir nøvnum frá Summarfestivalinum, sigur Steintór.







**UMMÆLI:**
**Framførslan í gjár kendist so verulig, at eg til tíðir kendi tað sum var eg stødd í einum livandi voksmuseumi. Búnarnir, mátin sum sangarar og tónleikarar úr svenska bólkinum Waterloo, sum spældu seg at vera Bjørn, Benny, Agnetha og Frida, fluttu seg, sangirnir, mátin sum áhoyrararnir livdu í løtuni - tað var sum at verða flutt aftur í tíðina, til ta tíðina, tá ið ABBA var á konsertferð í 1970unum.**

**UMMÆLI:**
**- Ikki bert sangarar í ABBA klæðum, men top trimmaðar sangarar við nógvum klassiskum instrumentum og kórum aftanfyri. Eisini fer eitt føroyskt barnakór at syngja nøkur løg við ABBA – the Show, sigur Steintór Rasmussen**




**UMMÆLI:**
**- Ikki bert sangarar í ABBA klæðum, men top trimmaðar sangarar við nógvum klassiskum instrumentum og kórum aftanfyri. Eisini fer eitt føroyskt barnakór at syngja nøkur løg við ABBA – the Show, sigur Steintór Rasmussen.**

**UMMÆLI:**
**Fyrsta eykalagið á konsertini var Waterloo og síðani kom Thank You For The Music. Áhoyrarafjøldin var frálíka og rópti bólkin inn aftur til eina avbera vakra útgávu av The Way Old Friends Do. Allir ABBA fjepparar í húsinum sungu við av fullum hjarta. Spell at hesin sangurin ikki er serliga kendur millum manna.**

**UMMÆLI:**
**- Leygarkvøldið verður tað stóra ABBA showið á Vágsbøi, og vit vænta, at ung sum gomul leita sær til Klaksvíkar hetta kvøldið, sigur Steintór Rasmussen.**